tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Torførar samráðingar fyri stavn

Oddagrein

Føroyar hava álvara verið í brennideplinum í danska høvuðsstaðnum seinastu dagarnar. Mikudagin helt landsstýrið kunnandi fund fyri fólkatingslimum og danskari og útlendskari pressu um fullveldisætlanina hjá landsstýrinum. Og hósdagin var spurnarorðaskifti um samráðingarnar millum stjórnina og landsstýrið um framtíðarstøðu Føroya.

Tað er synd at siga, at landsstýrið kom væl frá tí kunningarátakinum. Bara nakrir fáir - undir 10 - fólkatingslimir møttu upp, og hvørki stjórnin ella andstøðan hava broytt hugsan um framtíðarstøðu Føroya. Hetta fingu vit prógv um hósdagin, tá 93 fólkatingslimir tóku undir við samráðingarkósini hjá stjórnini.

Við øðrum orðum miseydnaðist lobbyátakið. Neyvan nakar broytti áskoðan, og tað er ivingarsamt, um landsstýrið fekk greitt donsku fjølmiðlunum frá, at landsstýrið og samráðingarútkastið vórðu misskild á samráðingarfundinum tann 17. desember.

Kunningarátakið skuldi ongantíð verið hildið. Og skuldu vit kunna fólkating og fjølmiðlar, so skuldi føroyska andstøðan sjálvandi verið við. Víst hevur landsstýrið ábyrgdina í Føroyum, og landsstýrið hevur stungið fullveldiskósina út í kortið, men vit eiga eisini hava í huga, at helmingurin av føroyingunum siga nei til fullveldi!

Tað komiska í øllum er kortini, at samstund-is sum stjórnin boðar frá, at hon kann ganga við til víttgangandi sjálvstýri, og sostatt tekur við føroysku andstøðuni meira ella minni, so sigur landsstýrið seg vera samt við donsku stjórnini.

Hetta verður gjørt í viðmerkingum á fullveldis-heimasíðuni á internetinum til røðuna hjá Poul Nyrup Rasmussen, forsætismálaráðharra. Hon er pettað upp í 9 brot, og eftir hvørt brot, hevur landsstýrið sínar viðmerkingar til røðuna. Í flest øllum førum er landsstýrið samt við stjórnini. Einasta veruliga undantak er 3 til 4 ára-skiftistíðin.

Ein niðurstøðan hjá fullveldisredaktiónini er, at nú fáa vit „virðiligari samráðingar". Hetta er beint øvugt av tí, sum bæði eygleiðarar og vanlig fólk halda. Tí eftir spurnarorðaskifti kann niðurstøðan ikki vera annað enn, at samráðingarnar verða torførar, ella harðar.

Sosialurin

Viðmerking:

Viðmerking til løgmann

Eg kann taka undir við løgmanni, tá hann sigur, at verkføll eru lemjandi fyri landið. Har eru vit øll samd. Tað er væl tí, at verkføll eru lutfallsliga sjáldsom í Føroyum. Men alt hevur so eina orsøk.

Høvuðsorsøkin til læraraverkfallið sær út til at vera, at løgtingið hevur samtykt eina lóg uttan at nøkur játtan fylgir við.

Løgtingið er suverænt, tá umræður at lóggeva sáttmálar (konventiónir) í gildi. Vanliga fylgir ein kostnaðarmeting við, men hetta er ikki altíð so og heldur ikki altíð neyðugt, tí útreiðslurnar koma ikki fyrr enn lógin verður sett í gildi, men eitt »skot« uppá útreiðslustøðið átti altíð at verið lagt við frá umsitingini.

Fyri at lógir skulu fáa gildi, skulu tær undirskrivast av løgmanni ella landsstýrismanni og síðani lýsast í kunngerðarblaðnum.

Tá ein lóg verður løgd fyri ein løgmann ella landsstýrismann til undirskrivingar, skal avvarðandi stýrisstjóri hava tryggjað, at lógin kann útinnast á fult lógligan hátt. Tað vil m.a. siga, at peningur er tøkur. Ger hesin ikki tað, so brýtur hann sína tænastuskyldu.

Um ein lóg verður sett í gildi uttan at játtan til útinnan av henni fyriliggur, so er hetta brot á stýrisskipanarlógina. Er hon harafturat sett í gildi ímóti tilráðing frá umsitingini orsaka av vantandi játta, so er eisini talan um brot á lóg um ábyrgd landsstýrismanna.

Nú eri eg ikki lógarkønur, men hatta var tað,ið eg fekk at vita, táið vit viðgjørdu stýrisskipanarlógina fyri nøkrum árum síðani.

Seinastu árini eru fleiri lógir samtytar og settar í gildi uttan at nøkur játtan hevur fylgt við. Tað er hent á samferðsluøkinum, á postverksøkinum og nú til seinast hevur so fíggjarmálaráðharrin sáttmálabundið landskassan fyri eitt ótal av milliónum, sum hann alment hevur sagt, at hann ikki ætlar at játta fult út. Ei undur í, at alt er við at koyra fast.

Tann nevndin,ið skuldi vera samfelagsins, »etiski« vaktarhundurin, landsstýrismálanevndin, virkar yvirhøvur ikki sum tilætlað. Høvuðsuppgávan hjá nevndini skuldi vera at ansa eftir, at etiska støðið í umsitingini var í lagi, og at mannagongdir vórðu fylgdar og betraðar, har tær ikki vóru góðar nokk.

Tá ein so forsiktigur og reiðiligur maður sum Signar á Brúnni má fara til hús vegna brot á stýrisskipanarlógina, so er ikki í lagi við systeminum, tað dugi eg at rokna út. Og síðan er noktað ein kanning – tað kann bara vera føroyskur politikkur, táið hann er ljótastur. Sjálvsagt eigur ein kanning av mannagongdum at verða gjørd, soleiðis at ongin annar heiðursmaður seinni kemur í hatta »feittifatið«.

Eitt annað dømi um óruddiligheit og tilvildarligheit hjá okkara útinnandi valdi er málið við Jákupi Mørkøre. Har var eitt dømi um ein leiðara, sum vildi halda sína játtan og ikki bróta stýrisskipanarlógina. Táið løgmaður hoyrdi um konsekvensirnar í fjølmiðlunum, reisti hann uggafjaðrarnar og Helena slaktaði ein stjóra, akkurát sum indiánararnir í Suðuramerika gera, táið teir vilja blíðka gudarnar. Og so var friður í tí framkomna rættarsamfelagnum Føroyar anno 2000. Um tað var bakari ella smiður,ið misti høvdið hjá okkum spurdi eingin um. Har skuldu bara lík á borðið, so var gott.

Tað skuldi verið so upplagt at gjørt eina tænastumannakanning av leiðsluni í almanna- og heilsustýrinum, ella alternativt sent Helenu til hús, tí hon eftir mínari fatan hevur roynt at trýst ein stovnsleiðara at bróta stýrisskipanarlógina.

Samanumtikið má eg siga við Anfinn Kallsberg, sum eg í nógvar mátar havi stóra virðing fyri, at tað er óforsvarliga óruddiligt umsitingarliga rundan um hann. Konsekvensirnir av hesum eru m.a. læraraverkfallið og tað at týðandi samfelagsfunktiónir brenna saman.

Vit mugu minnast til, at endaliga ábyrgdin av útinnandi valdinum hevur løgmaður einsamallur og hetta óskilið við at landsstýrisfólkini sleppa at slakta seg burtur úr teimum rasshøftum, tey eru komin í, má halda uppat.

Virðingarmest
Thomas Arabo

Duetoft formaður í Føroyanevndini

JOHN JOHANNESSEN

Peter Duetoft, úr Centrumsdemokratunum skal eftir øllum at døma verða formaður í serligu fólkatingsnevndini, sum skal fylgja samráðingunum millum stjórnina og landsstýrið.

Hetta visti danska TV2 at siga fyrrakvøldið.

Fólkatingið samtykti eftir aðalorðaskiftið hósdagim, at ein 21 manna nevnd skal setast at fylgja samráðingunum.

Grønlendsk vitjan

Grønlendski landsstýrismaðurin, Simon Olsen, verður á almennari vitjan í Føroyum í døgunum frá 11. til 14. apríl.

Hann skal vitja starvsbróður sín, Jørgin Niclasen, og í grønlendska fylginum eru eisini kona landsstýrismannin og tvey embætisfólk.

Simon Olsen skal hava politiskar samrøður við landsstýrið, hann skal vitja virki og stovar, og onkur útferð verður eisini gjørd.

ek

Velja nýggjan formann

JOHN JOHANNESSEN

Seinnapartin í dag hevur Tjóðveldisflokkurin eykafloksting á Hotel Hafnia í Hayn.

Á skránni er umskipan av leiðslubygnaði floksins, og veljast skal ein politiskur og umsitingarleiðari.

Sum er, hevur flokkurin eina tvístreingjaða leiðslu, men nú skal talan verða um eina leiðslu.

Roknað verður við, at nýggi formaðurin verður Høgni Hoydal

Lærararáðið stúrir fyri avleiðingum

Lærararáðið á Føroya Læraraskúla heitir á partarnar í Læraraverkfallinum um at taka samráðingarnar uppaftur sum skjótast.

Lærararáðið sigur seg í eini yvirlýsing stúra fyri avleiðingunum av verkfallinum.

– Vit heita á avvarandi myndugleikar at bera so í bandi, at ætlaninar í skúlalóg og kunngerð kunnu fremjast í verki, sigur Lærararáðið á Læraraskúlanum.

ek

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma

Ella Rasmussen

doyði og varð jarðað. Takk til øll tykkum mongu, sum fylgdu henni til gravar, takk fyri blómur og kransar, og takk til tykkum øll, sum hjálptu til á ymiskan hátt.

Eisini takka vit fyri peningagávur til Elim.

Familjunnar vegna

Inga, Ragnhild, Sámal og Óluva

Til reiðar at vinna!

Vit á Kaupthing hava tikið støðu og eru klár at taka dystin upp. So nú kanst tú gjøgnum okkum senda tínar pengar út at vinna fyri teg. Og sum tú veitst, pengar sum arbeiða, vaksa ofta skjótari enn pengar, sum liggja stillir. Tú kanst lata pengarnar arbeiða fyri teg upp á ymsar mátar. Tú kanst lata okkum umsita tína ogn serstakt við okkara ognarrøkt, ella tú kanst keypa partar í einum av okkara íløgufeløgum.

Ognarrøkt
Við eini avtalu um ognarrøkt letur tú okkara serfrøðingar á altjóða fíggjarmarknaðinum arbeiða fyri at fáa so stóran vinning av tínum ognum, sum gjørligt. Áðrenn vit byrja, avgera vit í felag, hvussu íløgurnar skulu gerast, soleiðis at íløgurnar hóska til tín tørv. Hevur tú gjørt eina avtalu við okkum um ognarrøkt, fært tú við føstum millumbili eina frágreiðing um, hvussu gongst tínum ognum. Hevur tú internetsamband og hevur fingið brúkaranavn og loyniorð, kanst tú á okkara heimasíðu dagliga fylgja við, hvussu gongst tínum ognum.

Íløgufeløg
Eitt íløgufelag er eitt felag við limum, sum við størri og smærri upphæddum eru gingnir saman um at gera íløgur í partabrøv og lánsbrøv á altjóða fíggjarmarknaðinum. Hetta merkir, at tann lítli innskjótarin í íløgufelagnum fær somu stórrakstrarfyrimunir, sum stórir íleggjarar. Í Kaupthing hava vit fleiri sløg av íløgufeløgum, sum okkara fólk við serkunnleika umsita. Sostætt ber altíð til at finna eitt íløgufelag í Kaupthing, sum hóskar júst til títt lindi. Vinningurin av íløgum í íløgufeløgunum var í 1999 millum 8% og 36%.

Um Kaupthing
Kaupthing var stovnað í 1982 og tók leiðsluna í globaliseringini av tí íslendska fíggjarheiminum við handli av útlendskum partabrøvum, stovnseting av útlendskum íløgufeløgum, og stovnseting av deild í Luksemburg. Nú hevur Kaupthing so latið upp deild í Føroyum og eisini í New York. Tað arbeiða yvir 200 fólk hjá Kaupthing, harav nú 3 í Føroyum. Hesi vælútbúnu fólk hava tilogna sær eina servitan innan so gott sum øll øki í fíggjarheiminum. Kaupthing umsitur yvir 20 milliardir DKK fyri síni viðskiftafólk ígjøgnum ognarrøkt og íløgufeløgini.

Kundi tú hugsað tær at latið okkum røkt tínar ognir ella at gera íløgu í eitt íløgufelag, ella tú vilt vita meira, so ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

SANSIR TEL 355355

KAUPTHING
ÍLØGUBANKI

Kaupthing Føroyar, Box 3090, 110 Tórshavn,
Tel 351500, www.kaupthing.com